2010-41-00417 (7)

# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI EITT ØKI ÚTI Á DAL Í MIÐVÁGI.

## ÁSETINGAR FYRI ØKIÐ F3

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954 við seinni broytingum verða skipaðar hesar ásetingar fyri tað økið í Vága kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

Grein 1. Økið

Økið er avmarkað, so sum víst er á viðfesta fylgikort , og fevnir um hesar ognir í Miðvági:

Matr. nrr. 4b, 4c, 4d, 4e, 4f, 4g, 4h, 4i, 4k, 4l, 4m og um allar jarðarlutir, sum eftir 28. oktobur 2010 verða frábýttar hesum ognum.

Grein 2. Ætlanin við økinum

Ætlanin er at nýta økið til frítíðarvirksemi av ymsum slag, helst tílíkt, sum liggur betur nakað burtur frá bygdum øki.

Grein 3. Nýtsla av økinum

a. Økið verður lagt av til frítíðarvirksemi av ymsum slag so sum ítróttarvallir, spælipláss, útiverupláss, ríðihallir, felags rossafjós, felags seyðafjós, bilstøðlar o.t..

b. Innan fyri økini mugu bara vera gjørd virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarandi økispørtum og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við tey.

Grein 4. Byggistig

Byggistigið fyri økið sum heild má ikki fara upp um 0,3.

Grein 5. Aðrar ásetingar

Ásetingarnar í byggisamtyktini galdandi fyri Miðvág, sum ikki verða avloystar av serásetingunum í hesi samtykt, eru framvegis galdandi, herundir eisini ásetingarnar í kapittul III og IV.

Soleiðis samtykt á fundi tann 28. oktobur 2010.

Vága kommuna